# Video/DVD 3arin Fløgur

## A Beautiful Mind




Eitt matematiskt geni, John Forbes Nash, Jr., gjørdi eina hugtakandi uppdaging tá hann var ungur og var tað um reppið, at hann fekk eina altjóða viðurkenning. Men hansara ótrúliga karriera var skumpað til síðis av trupulleikum, sum kundu oyðilagt nógvar menn. Hóast heta, berjist Nash fyri at koma aftur. Hann hevur altíð verið stýrdur av hansara leitan eftir tí sanna orginala hugskotinum, og hevur ongantíð mist tann dreymin. Aftaná nógv ár, har hann berjist fyri dreyminum, vinnur hann og bókstaviliga broytir heimin.

Kritikararnir hava tikið væl ímóti hesum filmi, sum hevur vunnið ikki minni enn fýra Oscars – harímillum besta film.

A Beautiful Mind er nú at fáa á sjónbandi og DVD.

## Crossroads



Filmurin er um tær tríggjar barnavinkonurnar, Lucy, Kit og Mimi, sum finna saman aftur á einum túri kring USA eftir ikki at hava sæð hvørja aðra í átta ár. Her kemur vinarlag teirra aftur undan kavi. Á einum túri við næstan ongum pengum, men eini rúgvu av dreymum, sleppa tær tríggjar vinkonurnar, við vakra, men gátuføra vini Mimi, Ben. »On the road« hava tær upplivingar, sum ikki bert broyta teirra lív, men sum eisini vísa teimum, hvussu týdningarmikið tað er at lurta eftir hjartanum.

Crossroads er nú at fáa á sjónbandi og á DVD.

## Ace of Base – Da Capo




Ein tann nýggjasta fløgan á fløgumarknaðinum í dag, er fløgan hjá Ace of Bace – Da Capo.

Ikki hevur verið nógv at hoyra til tey fýra, Jonas, Jenny, Linn og Ulf, sum hava so at siga ligið still síðani ár 2000, men í ár hava tey givið út singlina – Beautiful Summer. Og nú er fløgan Da Capo útkomin.

Útgávudagurin var 30. september og inniheldur fløgan 12 sangir. Hon er komin út í Danmark, Svøríki, Týsklandi, Noregi, Finlandi, Eysturíki, Sveits, Belgia, Hollandi og Ungarn.

## Leann Rimes – Twisted Angel

Kvinnan, ið byrjaði sum country sangarinda ger nú aftur um seg. Leann Rimes gav 1. oktober út fløguna Twisted Angel. Fløgan inniheldur 13 sangir.







## Jon Bon Jovi – Bounce

Áttanda studio-útgávan frá Bon Jovi, hevur fingið heitið "Bounce", og er sambært bólkinum ein mynd av tí ið teir hava verið ígjøgnum tað síðsta árið, - serliga aftaná 11. september 2001.

Til Grammy Awards 2000 var vanligi tátturin "Song of the year" (ársins sangur), eisini við. Vinnararnir av hesum bólkum gjørdist, nr 1: Backstreet Boys við I want it that way, og nr 2: Ricky Martin við living la vida loca.

I want it that way er skrivaður av Andreas Carlsson og Max Martin, og Livin' La Vida Loca er skrivaður av Desmond Child og Robi Rosa.

Andreas Carlsson og Desmond Child ganga aftur í nýggju útgávuni "Bounce" hjá New Jersey rokkarunum Bon Jovi. Andreas Carlsson hevur saman við Max Martin syrgt fyri seinastu árini at hildið bæði Britney Spears og Backstreet Boys á toppinum við at skriva og framleiða hesar ótrúligu landaplágurnar, sum t.d. "Baby One More Time", "Crazy" og "Oops I Did It Again" og somuleiðis "Backstreet's Back", I Want It That Way" og "Larger Than Life".

Desmond Child hevur skrivað, og framleitt nøkur av teimum størstu hittunum í gjøgnum seinastu tjúgu árini. Nevnast kunnu t.d. "I was made for loving you" (Kiss), "Dude looks like a lady" og "Crazy" (Aerosmith), "I hate myself for loving you" (Joan Jett), "How can we be lovers" (Michael Bolton), "Living la vida loca" og "Shake your bon bon" (Ricky Martin) og hevur somuleiðis skrivað "You give love a bad name", "Living on a prayer", "Bad medicine" og "Keep the faith" (Bon Jovi)

Hesir Báðir Andreas Carlsson og Desmond Child, hava verið við til at skriva heili 6 løg av hesi nýggju Bon Jovi útgávuni.

Tónleikurin á fløguni er ógvuliga fjølbroyttur, har er alt frá hørðum rokki til bleytar balladur. Summastaðni er eisini eitt íslett av elektroniskum tónleiki.

Um vit taka eitt lag sum heitislagið "Bounce", so minnir hettar ikki sørt um hittið "it's my life", sum teir høvdu fyri nøkrum árum síðani. Nevnast kann eisini nevnast "Everyday", ið longu hevur verið nógv at hoyrt á MTV og í útvarpi, og sum sníkt seg heilt upp í toppin á okkara egna "hittlista" 15-tær bestu.

Alt í alt kann sigast, at hettar er ein góð rokkfløga, ið fevnir vítt, bæði um einum dámar rokk, ella ikki.

### Fakta:



| | |
|---|---|
| Bólkur/einstaklingur: | Bon Jovi |
| Heiti á útgávu: | Bounce |
| Útgávudato: | 23. september 2002 |
| Skeringar á útgávu: | 12 |
| Longd á útgávu: | 49,6 min |
| Framleiðari: | Luke Ebbin, Jon Bon Jovi, Richie Sambora, Desmond Child og Andreas Carlsson |
| Útgávufelag: | Universal |

**Meting:**

| | |
|---|---|
| Ljóðgóðska: | ●●●● |
| Dygd í løgum: | ●●● |
| Heildarmeting: | ●●●◖ |

## Topp 10 - fløgur

01. Ymiskt - Now 1
02. Bon Jovi - Bounce
03. Elvis - # 1 Hits
04. Atomic Kitten - Feels so Good
05. Eminem - The Eminem SHow
06. Pink - Mizzundastood
07. Linkin Park - Reanimation
08. Def Leppard - X
09. Life House - Stanley Climbfall
10. M. L. T. R. - 19 Lovesongs

## Topp 10 - video

01. Ringenes Herre
02. Harry Potter
03. Rush Hour 2
04. Fast and Furious
05. American pie 2
06. Hal's store kærlighed
07. Polle Fiction
08. The Animal
09. Black Hawk Down
10. Behind Enemy Lines

## Topp 10 - DVD

01. Ringenes Herre
02. Rush Hour 2
03. Fast and Furious
04. Harry Potter
05. American Pie 2
06. Black Hawk Down
07. Behind Enemy Lines
08. The Animal
09. Hal's store kærlighed
10. Vanilla Sky



UTTAN ÚR HEIMI

# Beinir Saddam ikki fyri sínum vápnum, fara vit at gera tað



**- Í ellivu ár hevur Saddam Hussein lumpað altjóða samfelagið, men nú er nóg mikið, segði amerikanski forsetin, George W. Bush, í røðu fyri amerikanska fólkinum gjáranáttina**

IRAK-KREPPAN

*Árni Joensen*

- Vit vita, at Saddam Hussein hevur kemisk og biologisk vápn, tí tey hevur hann brúkt ímóti sínum egna fólki. Eydnast tað honum at fáa fatur á tilfarinum, kann hann útvega sær kjarnorkuvápn innan eitt ár, segði George W. Bush í røðuni, sum hann helt í Cincinnati í statinum Ohio.

Í røðuni, sum vardi ein hálvan tíma, kom amerikanski forsetin ikki við nøkrum nýggjum upplýsingum, men røðan var kortini ein greiður boðskapur til irakska forsetan og altjóða samfelagið. Hann segði tað vera sera umráðandi, at trygdarráðið hjá ST gera eina samtykt, sum fer munandi longur enn tær gomlu samtyltirnar, og at vápnaeftirlitsmenninir hjá ST skulu fáa atgongd til alt, sum teir vilja sleppa at kanna.

- Saddam stuðlar yvirgangsfelagsskapum og yvirgangsmonnum, og hann fer ikki at aftra seg við at lata teimum hópoyðingarvápn, segði Bush.

Hann vendi sær eisini til teir iraksku heryvirmenninar og mælti teimum til at sýta fyri at gera eftir boðum forsetans, verða teir bidnir um at nýta hópoyð-ingarvápn í einum møguligum kríggi.

- Gevur Saddam teimum boð um at nýta hópoyðingarvápn, eiga teir at sýta fyri at nýta tey. Gera teir ikki tað, skulu teir vita, at krígsbrotsmenn verða at enda tiknir og drignir til svars fyri gerðir sínar, segði amerikanski forsetin.

### Nóg mikið

Bush segði, at seinastu ellivu árini hevur irakski forsetin lumpað altjóða samfelagið og gjørt gjøldur burtur úr vápnaeftirlitsmonnum og diplomatum. Men nú er nóg mikið. USA fer ikki at sita hendur í favn, meðan hóttanin úr Irak veksur dag frá degi. Heimssamfelagið hevur roynt seg við diplomatiskum arbeiði, búskaparligum tiltøkum og flogbanni, men Saddam Hussein heldur ótroyttiligur fram við at gera hópoyðingarvápn, segði amerikanski forsetin.

Hann ivaðist ikki í, at amerikanska hermegin er før fyri at steðga irakska leiðaranum, men tann stóra spurningin helt hann vera, um Irak hevur kjarnorkuvápn.

- Tað vita vit ikki við vissu, men vit vita, at Saddam kann røkka hesum málinum um stutta tíð. Hann kann útvega sær uran uttanlands, og hann sigst hava trý støð, har hann kann ríka uranið, segði Bush forseti og legði afturat:

- Gevst Saddam ikki nú og letur Irak avvápna, er USA til reiðar at standa fyri einum átaki ímóti honum.

# Neyðugt átak ella hópmorð?

**Ísraelska stjórnin sigur, at álopið á býin Khan Younis mánadagin var neyðugt. Palestinar siga, at átakið var eitt hópmorð**

MIÐEYSTUR

*Árni Joensen*

14 fólk lógu eftirá, og 80 onnur vórðu særd, tá ísraelskir stríðsvognar og tyrlur søktu at býnum Khan Younis í Gaza-geiranum fyrradagin.

- Eitt hópmorð ímóti fólki okkara, segði ein illur Yasser Arafat.

- Sorry, men vit eru í kríggi, og hetta var neyðugt, segði ísraelski varaverjumálaráðharrin Weizman Shiri, sum tó harmaðist um, at sivilir palestinar høvdi latið lív í álopinum.

Víðgongdi palestinski felagsskapurin Hamaz var hvassari í sínum orðavali.

- Allir ísraelsmenn eru drápsmenn. Ikki ein einasti teirra er ósekur, segði ein talsmaður hjá felagsskapinum aftan á álopið. Hamaz hevur longu skýrt dagin "tann blóðuga mánadagin".

Ísraelski verjumálaráðharrin, Benyamin Ben-Eliezer, vardi álopið við at siga, at teir flestu pale-stinararnir, sum doyðu í álopinum á Khan Younis, vóru vápnaðir stríðsmenn. Men amerikanska stjórnin sýtti fyri at góðtaka ta frágreiðingina.

- Ísrael hevur rætt til sjálvverju, men ísraelsmenn eiga at hugsa seg væl um, tí tílíkt kann fáa avleiðingar. Teir eiga tí at gera tað, sum gerast kann fyri at forða fyri, at ósek fólk doyggja, segði ein talsmaður hjá amerikanska trygdarráðnum.

Eisini amerikanska uttanríkisráðið fanst at álopinum.

- USA væntar, at Ísrael alt fyri eitt tekur neyðug stig, so tílíkt ikki hendir aftur, segði talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum, Richard Boucher.

## Toskurin ovfiskaður

Norðmenn vilja vera við, at ov nógv er veitt av toski í Barentshavinum í ár. Tað er ikki óhugsandi, at veiðan er farin umleið 50.000 tons upp um heildarkvotuna, sum er 395.000 tons.

Norska fiskiveiðieftirlitið sigur, at toskaveiðan hjá norskum skipum er helst 20.000 tons omanfyri ta ásettu kvotuna. Samstundis hevur eftirlitið skrásett, at 28.000 tons av toski eru umskipað við Bjarnoynna higartil í ár. Halda hesi tølini, er ovveiðan 48.000 tons, men sagt verður, at talið kann fara báðar vegir.

Norska fiskiveiðieftirlitið fer um stutta tíð at tosa við russiska eftirlitið. M. a. vilja norðmenn hava at vita, hvussu nógv av tí, sum er umskipað við Bjarnoynna, er fiskað burtur av russisku kvotuni.

## Friðurin í vanda

Ein avdúking um njósning kann gera enda á friðartilgongdini í Norðurírlandi.

Tað er komið fram, at týðandi politikarar hava latið IRA loyniligar upplýsingar, og avdúkingin hevur havt við sær, at protestantarnir nú krevja, at Sinn Fein verður koyrdur burtur úr savningarstjórnini í Belfast. Sinn Fein er tann politiski vongurin av IRA.

Protestantiski fyrstiráðharrin, David Trimble, sigur, at limir í Sinn Fein hava skipað fyri umfatandi njósning, og seinasta fríggjadag rannsakaði norðurírska løgreglan skrivstovurnar hjá Sinn Fein.

## Nærkast 30%

Norski Framburðsflokkurin fær nú so stóra undirtøku millum veljar-arnar, at hann er størri enn teir tríggir stjórnarflokkarnir tilsamans.

Ein nýggj veljarakanning gevur Framburðsflokkinum 29,5 prosent av atkvøðunum, meðan teir tríggir stjórnarflokkarnir tilsamans fáa 26 prosent. Hjá Framburðsflokkinum er talan um eina framgongd upp á fýra prosent, meðan tann størsti stjórnarflokkurin, Høgri, missir 3,5 prosent. Kristiligi Fólkaflokkurin hjá Kjell Magne Bondevik, forsætisráðharra missir hálvtannað prosent, meðan Vinstri stendur í stað.

Veljarakanningin gevur Arbeiðaraflokkinum 21 prosent og Sosialistiska Vinstraflokkinum 17 prosent. Hetta merkir, at tríggir teir størstu flokkarnir eru uttan fyri stjórnina.

## Ikki Cook kortini

Bretski skiparin og rannsóknarmaðurin James Cook var kanska ikki tann fyrsti evropearin, sum kom til Avstralia. Hetta hevur annars verið tann vanliga hugsanin, men nú vilja bretar sjálvir vera við, at ein annar evropeari var kanska har longu hundrað ár undan Cook.

Tann nýggja metingin er grundað á eitt skipsvrak, sum er funnið við oynna Fraser Island úti fyri avstralsku eysturstrondini. Í vrakinum hava granskarar funnið kanónir, sum týðiliga eru evropeiskar, men sum líka týðiliga ikki eru av bretskum uppruna.

Bretski skipsserfrøðingurin Greg Jeffreys sigur, at talan er um vrakið av einum evropeiskum skipi frá umleið 1650, og tað er alment kent, at bæði spaniumenn, portugisar og niðurlendingar sigldu á havleiðunum við Avstralia, áðrenn James Cook kom hagar. Higartil hevur verið hildið, at Cook var tann fyrsti evropearin, sum settin fótin á land í Avstralia. Tað hendi í 1770.